# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Verður undantaksstøðan í Pakistan ikki sett úr gildi, verður landið koyrt úr bretska samveldinum*

*(David Miliband, uttanríkisráðharri)*

# Nú skulu tey samstarva

**Seinastu veljarakanningarnar undan valinum í Danmark vísa, at Danski Fólkaflokkurin og Ny Alliance skulu tryggja stjórnini meiriluta**



*Pia Kjærsgaard og Naser Khader hava havt mangan dystin undir valstríðnum, men sambært veljarakanningunum skulu tey samstarva aftan á valið*

Tær seinastu veljarakanningarnar undan fólkatingsvalinum í Danmark í dag vísa ymisk úrslit, men verða úrslitini løgd saman, er niðurstøðan, at stjórnin hjá Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra verður sitandi, men nú við stuðuli frá Danska Fólkaflokkinum og Ny Alliance.

Eftir manningunum fær Vinstri 25,2 prosent av atkvøðunum, Konservativi Fólkaflokkurin 10,9 prosent og Danski Fólkaflokkurin 12,7 prosent. Vinstri missir sjey tingmenn, Konservativi fær ein afturat, og DF missir tveir.

Tað merkir, at stjórnarflokkarnir og Danski Fólkaflokkurin skulu hava stuðul frá Ny Alliance fyri at varðveita meirilutan í Fólkatinginum, og hóast Ny Alliance hevur peikað á Anders Fogh Rasmussen sum forsætisráðharra, so skulu bæði Danski Fólkaflokkurin og Ny Alliance slakað í týdningarmiklum málum, skulu teir báðir flokkarnir standa saman um stjórnina.

**SF tvífaldaður**

Sosialdemokratarnir fáa sambært einum samandrátti av dagsins veljarakanningum 25,2 prosent av atkvøðunum ella júst tað sama sum Vinstri. Tann stóri vinnarin á vinstravonginum er Sosialistiski Fólkaflokkurin, sum sambært kanningunum fær 13,2 prosent ímóti 6,0 prosentum seinast. Tað gevur flokkinum 23 umboð í Fólkatingið ímóti teimum 11, sum flokkurin hevur nú.

Taparin vinstrumegin miðjuna er Radikali Vinstri, sum missir seks tingmenn. Úrslitið kemur kortini ikki óvart á, tí flokkurin hevur mist Naser Kaader og Anders Samuelsen, sum stovnaðu Ny Alliance.

# Obama togar inn á Hillary

**Munurin millum tey bæði fremstu forsetavalevnini hjá demokratunum er tódnaður í seinastuni**

Teir flestu demokratarnir í USA vilja framvegis hava fyrrveandi forsetafrúuna aftur í Hvítu Húsini í Washington, men altsamt fleiri demokratar vilja heldur skriva søgu við at fáa ein littan forseta.

Fyri nøkrum mánaðum síðani var Hillary Clinton umleið 30 prosentstig framman fyri Barrack Obama, men sambært teimum seinastu kanningunum er munurin nú minkaður niður í 19 prosentstig. Eftir kanningini, sum CNN hevur gjørt, siga 44 prosent av demokratunum, at tey vilja hava Hillary Clinton til forseta, og 25 prosent vilja heldur hava Barrack Obama.

Tvær kanningar, sum eru gjørdar í tí vanliga so týdningarmikla statinum New Hampshire, vísa eisini, at munurin millum tey bæði fremstu valevnini hjá demokratunum er minkandi.



*Hillary Clinton kann ikki kenna seg so vísa í at gerast forsetavalevni hjá demokratunum*

## STUTT SAGT

### Fleiri flýggja

Altsamt fleiri fólk taka nú til rýmingar úr somaliska høvuðsstaðnum Mogadishu, har harðir bardagar hava verið teir seinastu dagarnar. ST heldur, at umleið 850.000 fólk eru flýdd úr býnum, og at næøstan 100.000 teirra eru flýdd haðani tær báðar seinastu vikurnar. Bardagarnir millum islsmskar uppreistrarmenn og somaliska herin eru teir harðastu í fleiri mánaðir, og ST hevur heitt á partarnar um ikki at søkja at sivilfólkinum ella sivilum málum.

### Drápsmaður hjartaliga móttøku

Russarin Vitalij Kalojev, sum fekk átta ára fongsul fyri at hava myrt ein danskan flúgvileiðara í Sveis, er komin aftur til Russlands eftir at hava sitið í fongsli í Sveis. Vitalij Kalojev misti konuna og bæði børnini, tá eitt russiskt ferðamannaflogfar og eitt týskt flutningsflogfar stoyttu saman uppi yvir Suðurtýsklandi. Danin Peter Nielsen hevði vakt hjá sveisiska flogeftirlitinum tað kvøldið í 2002, og Vitalij Kalojev hevndi konuna og børnini við at beina fyri flúgvileiðaranum. Hann varð dømdur átta ára fongsul í Svris, men herfyri stytti sveisiski hægstirættur revsingina, soleiðis at Vitalij Kalojev kundi sleppa aftur til Russlands. Hann kom til Moskva í gjár, har hann fekk eina hjartaliga móttøku.

### Kirkjur og handlar í stríði

Protestantiska kirlkjan í Týsklandi heldur tað vera skeivt, at handlarnir í Berlin sleppa at hava opið tíggju sunnudagar um árið. Wolfgang Hubner, sum er biskupur í Berlin og formaður í evangeliska kirkjuráðnum í Týsklandi, hevur gjørt av at leggja málið fyri grundlógardómstólin í Karlsruhe. Wolfgang Hubner fýlist serliga á, at handlarnir í høvuðsstaðnum sleppa at hava opið allar teir fýra sunnudagarnar í adventini.